Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir

(Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskimannafrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Í 2024 er endurgjaldið samvarandi 16,3 prosent av frádráttinum, í 2025 er endurgjaldið samsvarandi 12,2 prosent, í 2026 er endurgjaldið samsvarandi 14,3 prosent og frá 2027 er endurgjaldið samsvarandi 19,1 prosent."

2. Í § 4 verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Í 2024 er endurgjaldið samsvarandi 15,3 prosent av frádráttinum, í 2025 er endurgjaldið samsvarandi 11,5 prosent, í 2026 er endurgjaldið samsvarandi 9,6 prosent, í 2027 er endurgjaldið samsvarandi 12,7 prosent og frá 2028 er endurgjaldið samsvarandi 19,1 prosent."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 15. desember 2023 við 18-0-15 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 19. desember 2023

stjóri

LM-038/2023